Hanna Jensen
løgtingsmaður **Nr. 28/2020**

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um týðaraútbúgving, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Er nakað fyrireikingaarbeiði gjørt fyri at seta í gongd útbúgving í føroyskum máli við týðing úr føroyskum fyri eyga?
2. Hvussu kundi ein týðaraútbúgving verið viðvíkjandi innihaldi, longd, og útbúgvingarstigi? Og hvussu skuldi hon verið skipað og hvør skuldi havt ábyrgd av slíkari útbúgving?
3. Nær kundi ein tílík útbúgving farið í gongd, og hvør er væntaði kostnaðurin?

Viðmerkingar:
Týðing er ein heldur ósjónlig funktión, tó at týðing hevur alstóran týdning fyri eitt mál- og mentanarøki. Fyri føroyska málsamfelagið er eyðsæð, hvussu nógv bókmentir av øllum slagi leggja afturat, tá tær verða týddar til føroyskt. Tær fjølga og fjøltátta um úrvalið, sum fólkið her kann lesa – uttan mun til aldur og kyn / børn, ung, tilkomin og eldri.
Føroyskar bókmentir eru ómetaliga týdningarmiklar og okkara skrivandi fólk fremja regluliga brøgd, tá tey aftur og aftur geva út tilfar til gagns fyri útbúgvingar, føroyska málið og fyri mentan okkara sum heild.
Eins glað vit eru um stóru framleiðsluna á føroyskum eins hugsavnað eiga vit at vera um, at marknaðurin, sum skal keypa og lesa tilfarið, er avmarkaður, og her kundu miðvís átøk verið gjørd at víðka um møguleikarnar at koma út um landoddarnar við føroyskum dygdartilfari og skapt betri vinnumøguleikar fyri okkara breiða skara av rithøvundum.
Undirvísing í føroyskum á lærdum stovnum í grannalondum og aðrastaðni er sera sjáldsom og minkandi. Tí eru heldur fá, sum fáa høvi at læra føroyskt, so tey kunnu týða okkara bókmentir til sítt móðurmál. Tí tað er ein sannroynd, at reglulig skeið í føroyskum máli fyri norðurlendingar ella útlendingar sum heild vekja áhuga fyri føroyskum bókmentum, máli og mentan og hava fyrr tryggjað okkum nakrar hollar týðarar. Summar av hesum, hevur FarLit kunna nýtt í sínum arbeiði við at marknaðarføra føroyskar bókmentir uttanlands.
Mangt bendir á, at miðvís átøk eiga at verða gjørd fyri at tryggja, at fleiri útlendingar, sum virka ella ætla at virka sum týðarar, læra føroyskt. Avtalur kunnu verða gjørdar við útvald universitet í øðrum londum um regluliga at bjóða eitt minstamark av undirvísing í føroyskum máli. Men ein heilt munadygg loysn kundi verið at sett slíka málrættaða útbúgving á stovn í Føroyum, t.d. á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, sum kundi tryggjað, at hon varð fyrireikað soleiðis, at hon varð hildin, so at fólk kundu luttikið sum part av lestri í øðrum londum – sum skiftislesandi í styttri ella longri tíðarskeið. Ella sum lesandi á Fróðskaparsetri Føroya á júst slíkari útbúgving.
Saman við eini størri upphædd á fíggjarlógini til týðing, kundi eitt tílíkt átak gjørt heilt stóran mun fyri føroyskar rithøvundar og fyri føroyskt mál.
Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi 9. oktobur 2020

Hanna Jensen